Tjóðskjalasavnið

Útgáva 04.09.20

# Dátuleiðsluætlan (datamanagementplan)- vegleiðing

| **Grundupplýsingar** | |
|---|---|
| **Samleiki** | Ein relevantur samleiki, møguliga veittur av fíggjarveitara og/ella myndugleika |
| **Fíggjarveitari** | Navn á fíggjarveitara, um so er, at hetta hevur týdning |
| **Nummar á peningajáttan** | Tilvísing til eina játtanarfrágreiðing, um hon er tøk |
| **Heiti á verkætlan** | Hevur tú søkt um fígging, nýt so sama navn sum í umsóknini |
| **Lýsing av verkætlan** | Greið í stuttum frá, hvat fyri slag granskingin er, soleiðis at onnur skilja endamálið við dátusavningini:<br>• Hvat fyri slag av granskingarætlan er talan um?<br>• Hvørjar granskingarspurdómar roynir tú at svara?<br>• Hvat er endamálið við dátuinnsavningini? |
| **Høvuðsgranskari** | Navnið á høvuðsgranskara í verkætlanini |
| **Samleiki/ID** hjá granskara | T.d. ORCID |
| **Kontaktpersónur** | Navn (um tað er annar enn høvusgranskarin), tlf.nummar, t-postadressa |
| **Dagfesting av fyrstu útgávu** | Skriva dagfesting fyri fyrstu útgávuna av tínari dátuleiðsluætlan |
| **Dagfesting av seinastu broyting** | Skriva nær tú seinast broytti dátuleiðsluætlanina? |
| **Politikkur** | • Fylgir tín dátuleiðsluætlan verandi mannagongdum?<br>• Hevur tín stovnur/granskingartoymi nakrar leiðreglur fyri dátuleiðslu?<br>• Hevur tín stovnur nakrar ávísar leiðreglur fyri dátutrygd?<br>• Setur tín fíggjarveitari nøkur krøv viðv. dátuleiðsluætlan?<br>• Brúkar tú nakrar formligar standardir í sambandi við dátuleiðsluætlana?<br><br>Nakrar av upplýsingunum, ið tú skrivar í dátuleiðsluætlana, byggja óivað á ymiskar politikkir. Tað er tískil eitt gott hugskot at greiða frá teimum her, soleiðis at tú kanst vísa til teir so hvørt. |
| **Dátuinnsavnan** | |
| **Hvørjar dátur ætlar tú at savna?** | Ger eina stutta lýsing av dátunum, umframt verandi dátum (gjørdar av tær ella triðjaparti), ið fara at verða brúktar.<br>Upplýs í øllum førum innihald, slag og hvat dáturnar umfata.<br>Lýs tíni val av formati/sniði og ritbúnaði og ætla um, hvørjar avleiðingar tíni val fara at hava við atliti at varðveiting, trygdaravriti og atgongd.<br><br>• Hvørji sløg av formatum og hvussu nógv fylla tey?<br>• Fara tíni format/snið og ritbúnaður at gera tað møguligt at tryggja langtíðarvarðveiting og –atgongd til tínar dátur?<br>• Finnast í løtuni dátur, ið tú kanst endurnýta? |

| | |
|---|---|
| **Hvussu fert tú at savna/framleiða dátur?** | Greið frá, hvussu dáturnar verða savnaðar/framleiddar og hvørji dátusnið/dátustandardir (um nakran) ætlanin er at brúka. Hugsa um, hvussu tú ætlar at skipa dáturnar í sambandi við verkætlanina, t.d. við at lýsa reglur fyri navnageving, útgávureglur og mappubygnað. Greið frá, hvussu tú tryggjar konsistens og góðsku í dátunum.<br>• Hvørjar standardar og háttaløg fert tú at brúka?<br>• Hvussu verða mappur og fílur skipaðar og navngivnar?<br>• Hvussu ætlar tú at handfara útgávustýring?<br>• Hvussu verða dáturnar góðskutryggjaðar? |

## Skjalfesting og metadátur

| | |
|---|---|
| **Hvat fyri slag av skjalfesting og metadátur skulu fylgja tínum dátum?** | • Hvør kunning er neyðug, fyri at tínar dátur kunnu lesast og skiljast í framtíðini?<br>• Hvussu ætlar tú at framleiða ta neyðuga skjalfestingina og metadáturnar?<br>• Hvørjar metadátustandardar fert tú at brúka og hví?<br><br>Greið frá, hvør skjalfesting verður knýtt at tínum dátum, soleiðis at uttanfyristandandi kunnu skilja og endurnýta dáturnar.<br><br>Í minsta lagi skulu vera nakrar grundleggjandi upplýsingar sum hjálp til at finna dátur, umframt hvør hevur framleitt dáturnar, eitt heiti, ein dagfesting og møguligar atgongdarforðingar.<br><br>Sí fráboðanarkema hjá Tjóðskjalasavninum og danska avhendingaskemaið sum eitt dømi upp á grundupplýsingar.<br><br>Skjalfestingin skal eisini innihalda upplýsingar um háttalag, greiningar, variabulásetingar, orðalista, mátingareindir, áskoðanir eins og snið/format og fílusnið.<br><br>Huga um, hvussu og hvar tú ætlar at greiða frá hesum upplýsingum. Tað er eitt gott hugskot at fylgja núverandi standardum. DDA (Dansk Data Arkiv brúkar til dømis DDI. |

## Etisk/siðfrøðilig og løgfrøðilig viðurskifti

| | |
|---|---|
| **Hvussu fert tú at handfara siðfrøðilig viðurskifti?** | - Hevur tú loyvi til at varðveita dátur og geva øðrum atgeingi til dátur?<br>- Hvussu tryggjar tú navnloynd hjá møguligum luttakarum í tínum royndum?<br>- Hvussu fert tú at handfara viðkvæmar persónsupplýsingar, soleiðis at tú veitir trygd fyri, at tær verða varðveittar trygt? At varðveita dátur á Tjóðskjalasavninum verður av Dátueftirlitinum síðustillað við at strika dátur, sostatt kunnu persónsviðkvæmar upplýsingar varðveitast á Tjóðskjalasavninum.<br><br>Siðfrøðiligir spurningar kunnu hava týdning fyri, hvussu tú viðgert tínar dátur. Bæði í sambandi við hvussu tær skulu varðveitast, hvør fær atgongd, og hvussu leingi tær eru varðveittar. Tú eigur at vísa, at tú ert eftiransin í siðfrøðiligum spurningum, og at tú hevur fyrilit fyri leiðreglunum á tínum stovni (eisini teimum, ið eru uttanfyri tey lógarásettu viðurskiftini). |
| **Hvussu fert tú at viðgera møguligar spurningar um upphavsrætt og vitbornan ognarrætt?** | • Hvør eigur dáturnar?<br>• Hvør skal geva loyvi til, at dáturnar kunnu endurnýtast?<br>• Eru nakrar avmarkingar hjá triðjaparti fyri at fáa fyri atgongd til at endurnýta dáturnar?<br>• Verður dátudeiling seinkað orsakað av útgávum ella patentum?<br><br>Greið frá, hvørji og hvussu mong skulu spyrjast um loyvi, um so er, at triðjipartur skal endurnýta dáturnar. |

| ## Varðveiting og trygdarvarðveiting | |
|---|---|
| **Hvussu fert tú at varðveita og tryggja avrit av dátum í sambandi við eina granskingarverkætlan?** | • Hevur tú goymslupláss tøkt?<br>• Hvussu gert tú trygdaravrit, soleiðis at tínar dátur ikki eru í vanda fyri at blíva burtur?<br>• Hvør hevur ábyrgd av trygdaravritum og endurstovning?<br>• Hvussu skulu dáturnar endurstovnast, um so er, at tú ert úti fyri óhappi?<br><br>Greið frá, hvussu ofta og hvar tú ætlar at gera trygdaravrit. |
| **Hvussu fert tú at viðgera atgongd og trygd?** | • Hvørjir vandar kanst tú ímynda tær við atliti at dátutrygd, og hvussu fert tú handfara teir?<br>• Ætlar tú gera serlig tiltøk í sambandi við atgongd til dáturnar?<br>• Hvussu fert tú at veita trygd fyri, at samstarvspartar kunnu fáa trygga atgongd til dáturnar?<br>• Um tú savnar dátur úti, hvussu tryggjar tú so, at dáturnar verða fluttar til tína skipan á ein tryggan hátt?<br><br>Um so er, at tínar dátur eru serliga viðkvæmar, er tað eitt gott hugskot at greiða nágreiniliga frá øllum trygdarviðurskiftum og regluligum standardum. |
| **Úrveljing og varðveiting** | |
| **Hvørjar dátur skulu varðveitast og/ella deilast við onnur?** | • Hvørjar dátur skulu varðveitast ella strikast grundað á lógarásett viðurskifti, sáttmálaviðurskifti ella onnur líknandi viðurskifti?<br>• Hvussu fert tú at avgera, hvørjar aðrar dátur skulu varðveitast?<br>• Hvørjar møguleikar fyri endurnýtslu av dátunum sært tú?<br>• Hvussu leingi skulu dátur varðveitast?<br><br>Ætla um hvørjar endurnýtslumøguleikar tínar dátur hava, bæði í sambandi við at validera tínar niðurstøður fyri at fáa til vega nýggj vísindarlig úrslit og í sambandi við undirvísing. |
| **Hvat er tín ætlan fyri langtíðarvarðveiting av dátum?** | • Hvar ætlar tú varðveita dáturnar fyri eftirtíðina? (til dømis á Tjóðskjalasavninum)<br>• Hvat krevst av tær fyri at gera tínar dátur klárar til langtíðarvarðveiting?<br><br>Met um tínar dátur hava varðveitingarvirði fyri eftirtíðina og eru egnaðar til arkivering.<br>Møguliga er tað nevnt í tínum játtanskrivi, um dáturnar skulu langtíðarvarðveitast. Set teg í samband við Tjóðskjalasavnið, um tú ert í iva. |
| **Dátudeiling** | |

| | |
|---|---|
| **Hvussu ætlar tú at deila dátur?** | • Hvussu kunnu møguligir brúkarar finna tínar dátur?<br>• Hvør kann fáa atgongd til tínar dátur og undir hvørjum umstøðum?<br>• Ætlar tú at deila tínar dátur gjøgnum tænastuna hjá Tjóðskjalasavninum ella tænastuna hjá einum øðrum veitara, ella fert tú sjálvur at standa fyri hesum?<br>• Nær verða dáturnar væntandi atkomuligar?<br>• Ætlar tú at hava eina DOI (persistant identifikation) atgongd til tínar dátur?<br><br>Hugsa um, hvussu tínar dátur kunnu gerast atkomuligar. |
| **Eru nakrar avmarkingar í sambandi við deiling av dátum?** | • Hvørji tiltøk fert tú at seta í verk fyri at minka um avmarkingar?<br>• Hvussu leingi hevur tú tørv á at hava atgongd til dáturnar einsamallur/-møll og hví?<br>• Er neyðugt við einari formligari avtalu um dátudeiling?<br><br>Greið frá øllum avbjóðingunum, ið tú kanst ímynda tær í sambandi við dátudeiling og greið frá, hvussu tú hugsar tær at klára hesar avbjóðingar. |
| **Ábyrgdarøki og tilfeingi** | |
| **Hvør hevur ábyrgd av dátumanagement?** | - Hvør hevur ábyrgd fyri íverkseting, eftirliti og tillaging av dátuleiðsluætlanini?<br>- Hvør hevur ábyrgdina av teimum einstøku uppgávunum í ætlanini? |
| **Hvat tilfeingi er neyðugt fyri at fullføra tína ætlan?** | • Tørvar tær ella serkøna hjálp uttanífrá? |